

*Fyrsti salur í Søldafirði, bygdur í 1920*

við hana, men hon segði, at fyrr hevði hon verið blind og livað í myrkri, men nú sá hon. Tað var ikki nógv at siga. Tað ber ikki til at avnokta lív, tað talar fyri seg sjálvt. Hesi nýumvendu kunnu rokna við forfylging. Biðið at tey mugu blíva hildin støðuføst, og at tey mugu lata seg leiða av Guds orði aleina.

*Í Sandoynni, har Dollin vitjaði, eru tvær smáar samkomur í Skálavík og Sandi.*

*Tað sama er í Kalsoynni.*

## Jarðarferðin hjá Sloan

*14. september 1914*

Eg var staddur i Porkeri, og beint fyri morgunmøtið frætti eg, at okkara kæri bróðir Mr. Sloan var heimkallaður. Dagin eftir fór eg til Havnar við motorbáti, og seks brøður úr tveimum smáum samkomum í Suðuroy vóru við. Jarðarferðin var týsdagin, og veðrið var av tí besta. Brøður komu av Viðareiði og Sørvági at fylgja. Kistan var dagin fyri sett inn í salin Ebenezer, og mong havnarfólk komu inn at síggja hetta friðsæla andlitið eina ferð enn. Salurin fyltist skjótt, og mong stóðu uttanfyri.

Stundin var hátíðarlig. Øll kendu saknin av einum sonnum vini. Nakrir sangir, sum Sloan dámdi so væl, vórðu sungnir, og so høvdu Brend og eg ein stuttan evangeliskan boðskap. Síðan bóru átta brøður kistuna í kirkjugarðin. Fylgið var tað størsta, sum hevur verið í Havnini til jarðaferð. Prósturin var við í fylginum, somuleiðis tveir prestar og aðrir leiðandi menn. Her vóru høg og lág, religiøs og ikki-religiøs vóru millum teirra, sum vildu æra okkara farna bróðir og fylgja honum til gravarbakkan.

Brend og eg søgdu nøkur orð á grøvini, meðan henda stóra mannfjøld við virðing stóð hjá.

Okkara bróðir er nú heima hjá Harra sínum eftir nógv ára tænastu á hesum einsamøllu oyggjum.

Tey fyrstu árini vóru merkt av andróðuri og royndum, og Sloan mátti mangan ígjøgnum forfylging. Samkoman í Føroyum hevur mist ein faðir, ein hirða og ein sera heiðurligan verkamann fyri evangeliinum. Í truplum tíðum hevði okkara bróður altíð vís ráð at geva, og alt grundaði hann á: "sum Harrin sjálvur segði". Tá tað gekk væl, var hann tann glaðasti av okkum, og hansara størsta eydna var at hoyra um, at sálir vóru vunnar fyri meistaranum. Tá fólk kom frá fjarskotnum bygdum og segði frá onkrum, sum hevði játtað trúgv, lyfti hann hondina og segði: "Latið okkum saman takka Gudi fyri Hansara góðsku og biðja um, at enn størri ting skullu henda".

Hansara arbeiði og lív talar framvegis, og minnið um hann verður ikki gloymt.

## Fyrireika blaðútgávu

*Í 1915 skrivar Echoes of Service:*

Harra og frú Danielsen hava vitjað nøkur fjarskotin pláss. Í Sørvági eru nøkur av børnunum hjá teimum trúgvandi eisini komin til Kristus.

Harra Brend og Harra Danielsen hava eftir inniliga bøn avgjørt at fara undir útgávu av einum evangeliskum blaði, sum skal eita Naade og Sandhed. Tað er longu heilt fitt av haldarum. Tað er stórur tørvur á einum slíkum tíðarriti í Føroyum. (Hetta var umrøtt í fyrsta parti). Danielsen biður okkum takka teimum vinum, sum hava sent honum Echoes.

## Ein sesong av signingum

*19. februar 1915*

Skipaferðslan til og úr oyggjunum hevur verið sera órógvað undir krígnum, og avleiðingarnar hava verið álvarsamar fyri fólkið, tí allir prísir eru hækkaðir nógv. Vit eru tó sannførd um, at okkara alvísi Gud og elskandi faðir, sum ræður yvir øllum, ger alt tað besta fyri okkum.

Mong eru gjøgnum trupulleikar og mótgongd drigin til frelsarans føtur, og okkara evangeliska arbeiði hevur verið stórliga signað.

Í desember vóru vit á eini vitjan í Norðoyggjum, har tað hetta seinasta árið eru fleiri konur, sum eru blivnar einkjur og harvið eru eisini faðirleys børn, eftir at forsyrgjari teirra er farin á sjónum. Takkað verið stuðul frá vinum í London vegna minnisgrunn Alexander Grant's (ein kina trúboðari), havi eg verið førur fyri at lata hesum einkjum hvør sína bíbliu, og tær eru móttiknar við tøkk.

*Tað er kanska komið nakað av blandi í árstølini. Feigdarárið í Norðoyggjum, sum Dollin skrivar um, má hava verið 1913. Tá gekk húsaskonnartin Marianna burtur við allari manningini. Ein bátur úr Svínoy gongur burtur 13. desember við 6 monnum. 23. desember hvørva tríggir bátar úr Norðoyggjum í einum illveðri við 19 monnum.*

*Ein av hesum var av Skarði og varð orsøkin til, at bygdin varð niðurløgd. Minst fimm menn fórust aðra staðni frá í Føroyum.*

Tað var sera eggjandi fyri okkum at síggja Guds fólk har norðuri hava heilagleika í lívinum, og at Harrin leggur afturat teimum, sum hava tikið ímóti frelsu.

Í januar hevði eg eina røð av møtum í Vágum. Tað kom nógvur áhugi til sjóndar, og vit sóu ávøkst fyri ævinleikan.

Eitt kvøldi aftan á møtið vóru fýra børn av kristnum foreldrum, sum grótu undir byrðini av syndum sínum, og dagin eftir játtaðu tey, at tey høvdu litið á, at Kristus hevði borið syndir teirra.

Vit eru beint komin heim úr Suðuroy. Í Vági leigaðu vit ein almennan sal og høvdu seytjan møtir. Vit høvdu ta gleði at hoyra og síggja syndarar finna frið við Gud. Summi kvøld vitnaðu fólk um frelsandi og varandi kraftina frá Jesusi, og vit gleddust um at síggja fruktir av seinastu vitjanini hjá Brend á hesum plássi. Prátið í bygdini hevur mest verið um møtini og um tey, sum játta Jesus. Satan hevur nýtt øll síni vápn at forða fólki í at koma til møtini, so fólk, sum knúgva undir syndabyrði, hava verið forðað í at hoyra lívgevandi orðið. Biðið fyri slíkum.

Í húsunum, har vit gistu, vóru sjey børn. Ein drongur, sum er átta og eitt hálvt ár, var hjartasorgin hjá kristnu foreldrum hansara. Aftaná møtið eitt kvøldi eggjaði mamman honum til at taka ímóti Kristusi. Tíðliga næsta morgun sá pápi hansara hann liggja á knæ við songina. Í bønini eftir morgundrekka luttók drongurin fyrstu ferð takkandi Gudi fyri at hava givið Sín son at doyggja fyri hann.

Nógvar ferðir hendan veturin havi eg havt trupulleikar við heilsuni. Tað er eftir øllum at døma galið við hjartanum, men nú er tað eitt sindur betri. Biðið fyri mær. Kona mín hevur verið før fyri at vera við mær á øllum mínum ferðum í vetur og hevur soleiðis kunnað hjálpt mær.

Sum eg skrivi, havi eg fingið eitt bræv frá næsta plássinum, sum vit ætla at vitja, nevniliga Hvalba. Tey siga, at undir grindadrápi eru tveir bátar koppaðu, og 14 mans ló tu lív. (Hetta var skaðagrindin í Sandvík 13. februar 1914). Um nakrar dagar vænta vit at vera millum tey, sum hava mist.

Brend er í løtuni í Kalsoy.



*Tíverri er tað ikki eydnast at finna myndirnar, sum Daniel hevði við sær úr Congo. Vit vita heldur ikki nógv um hansara trúboðaravirksemi. Men hesa myndina av dópi hava vit úr ritinum Congospor*

## Tíðindi frá Brend

Sama ár skrivar Brend um sera góð møti gjøgnum summarið, og serliga á ólavsøku, tá møti verða hildin bæði innan- og uttandura. Á einum møti vóru 30 bygdir umboðaðar í salinum Ebenezer. Tveir ungir menn tóku móti Kristusi, ein av teimum hevði leingi leitað eftir frelsu. Tíðliga í juli vóru tvær systrar (giftar konur) doyptar. Blaðið hjá Brend og Danielsen hevur gott og væl 600 haldarar. 50 ella fleiri fáa blaðið ókeypis, meðan fleiri hundrað eintøk verða býtt út sum traktatir.

## Andrew Sloan tekur við

*Aftur sama ár skrivar Daniel:*

Kona mín og eg eru beint komin aftur av ferð. Á Tvøroyri hava vit gjørt ein støðg, har vit býttu út bløð, vitjaðu hús, og funnu einslig trúgvandi, sum gingu Guds vegir. Í Hvalba og í Vági høvdu vit eina mennandi tíð, og vit høvdu so mong møtir, sum møguleiki var fyri.

Vit fóru síðan til Sandoyar, sum ikki hevur verið so nógv vitjað við evangeliinum. Fólkini vóru sera vinarlig, og vit vóru biðin um at fara til tær smærru bygdirnar, men vegurin var ikki opin. Vit støðgaðu í trimum bygdum í oynni. Tað var í Skálavík, har ein kristin familja býr, á Sandi og í Skopun. Vit vóru hjartaliga móttikin av fólkinum. Teimum dámdi sera væl at hoyra konu mína syngja, og summi komu frá fjarum plássum fyri at fáa tannlæknahjálp og ráð. (Brend var tannlækni og man hava verið við). Hús vóru vitjað, og vit vóru biðin um at vitja sjúk fólk. Her vóru nógvir møguleikar at fortelja um Lamb Guds, og vit høvdu evangelisk møti, tá møguleiki var. Yngsti sonur Sloan (Andrew) hjálpir í samkomuni í Havn.

## Familjur umvendar

*27. januar 1916*

Gjøgnum seinasta árið hava vit verið før fyri at boða evangeliið í ymiskum fjarskotnum oyggjum



*Tað er ikki nógvir trúboðarar úr norðanlondum, sum eins og Daniel er kendir fyri teirra mótstøðu móti viðferðini, sum tey innføddu fingu í Congo. Eitt annað undantak var svenski trúboðarin E.V. Sjøblom. Hann skrivaði í 1907 bókina I Palmernes Skygge, sum vísti á ræðuleikarnar*